# Reglugerð fyri Íðkaranevnd SSF

### Grein 1 – Heiti:

*Stk 1*: Svimjisamband Føroya hevur Íðkaranevnd í samsvar við reglugerð hjá IOC.

### Grein 2 – Endamál:

*Stk 1*: Nevndin skal umboða sjónarmiðini hjá teimum aktivu íðkarunum og er ráðgevandi hjá starvsnevnd og undirnevndum SSF í viðurskiftum hjá íðkarum.

*Stk 2*: Nevndin hevur fimm limir. Javnstøða skal vera í nevndini.

### Grein 3 – Val:

*Stk 1*: Valrætt hava tey ítróttarfólk, sum eru fylt 15 ár, og valbæri tey ítróttarfólk sum eru fylt 18 ár, ið hava umboðað teirra felag á føroyskari meistarastevnu undir SSF í seinasta lagi átta ár undan uppstilling til val í nevndina.

*Stk 2*: Limafeløg SSF seta fram uppskot um nevndarlimir. Feløg kunnu innstilla upp til tvey umboð hvør, tó við teirra treyt, at tey tvey umboðini tá hava hvør sítt kyn.

*Stk 3*: Íðkarar kunnu sjálvir stilla upp. Hertil krevst 10 stillarar, sum sjálvir hava valrætt.

*Stk 4*: Eru færri enn fimm íðkarar, sum stilla upp,  kann starvsnevndin velja valevni, sum uppfylla treytirnar í grein 3, stk. 1 og 2. Sama er galdandi um færri enn tvey eru uppstillaði av eina kyninum.

*Stk 5*: Starvsnevnd SSF skipar valið sambært reglugerð.

### Grein 4 – Valskeið:

Valskeiðið er fýra ár. Tó val annaðhvørt ár so at hvørji tvey eru ávikavist tveir og tríggir nevndarlimir fyri vali.

### Grein 5 – Innanhýsis skipan:

Nevndin skipar seg sjálv við forfólki og varaforfólki og skrivara. Forfólkið fær sæti í starvsnevnd SSF.

*Stk 2*: Hildnir verða í minsta lagi fýra fundir hvørt ár, og gerðabók verður førd. Starvsnevnd SSF er nevndini til hjálpar.

*Stk 3*: Tá ið atkvøtt verður, er vanligur meiriluti galdandi. Stendur á jøvnum í atkvøðugreiðslu er

ATLANTIC AIRWAYS

atkvøða forfólksins avgerandi.

***Samtykt á aðalfundi 23. mars 2023.***